Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 34 68 00
Fax: +298 34 68 01

www.sev.fo
E-mail: Sev@sev.fo

**Frágreiðing um broyting av íbindingargjøldum 2013**

Broytingin av íbindingargjøldunum bleiv avgjørd á aðalfundi í november 2012 í sambandi við viðgerð av Rakstrar- fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2013. Grundarlagið undir broytingini var kostnaðurin, sum SEV hevði av íbindingum gjøgnum fleiri ár. Eyðkenni var, at íbindingargjøldini stóðu ikki mát við tær útreiðslur, sum SEV hevði av íbindingunum. Fyri at lýsa viðurskiftini nágreiniliga er talva gjørd niðanfyri, sum vísur inntøkur og útreiðslur í hesum sambandi.

Talva við útreiðslum og inntøkum í sambandi við íløgur í netið (20/10 kV+ 0,4 kV)

| Ár | Íløgur í 20/10 kV + 0,4 kV netið í t.kr. | Inntøka av íbindingargjøldum í t.kr. | Avskrivingar uppá íløgur uppá 20/10 kV + 0,4 kV netið | Úrslit |
|---|---|---|---|---|
| **Rekkja** | (1) | (2) | (3) | (4) 1-2-3=4 |
| **2002** | 18.961 | 4.937 | 542 | -13.482 |
| **2003** | 12.359 | 3.561 | 895 | -7.903 |
| **2004** | 11.760 | 1.934 | 1.231 | -8.595 |
| **2005** | 11.711 | 1.429 | 1.565 | -8.717 |
| **2006** | 12.747 | 2.079 | 1.930 | -8.738 |
| **2007** | 12.862 | 2.630 | 2.297 | -7.935 |
| **2008** | 33.697 | 3.254 | 3.260 | -27.183 |
| **2009** | 14.679 | 2.094 | 3.679 | -8.906 |
| **2010** | 16.022 | 1.579 | 4.137 | -10.306 |
| **2011** | 13.583 | 1.333 | 4.525 | -7.725 |
| **2012** | 20.577 | 2.271 | 5.113 | -13.193 |
| **2013** | 22.205 | 6.948 | 5.748 | -9.509 |
| **2014** | 20.770 | 14.656 | 6.341 | 227 |
| **2015** | 29.463 | 15.387 | 7.183 | -6.893 |

Rekkja (3) er roknað sum avskrivingar av rekkju (1)

Fyritreytin fyri íbindingargjøldunum er, at inntøkur frá íbindingum og avskrivingarnar fyri tilsvarandi íløgur, uppá sikt skulu svara til íløgurnar í netið (10/20 kV og 0,4 kV). Kostnaðurin av rakstrinum av netinum verður nøktaður ígjøgnum raksturin hjá SEV frá sølu av el.

**Vestmanna:**
+298 34 68 00

**Klaksvík:**
+298 34 68 00

**Vágur:**
+298 34 68 00

SEV hevur royndir við, at kundar kunnu freistast til at leggja seg á væl meiri mátt enn teirra veruliga tørv, grundað á ov lágan kostnað fyri íbinding.

Orsøkin til at hava íbindingargjøld kann lýsast við at greiða frá, hvussu ein hugsað støða kundi verið um eingi íbindingargjøld vóru. Tá hevði størri trýst verið á SEV um at byggja netið út til veiting av el til lítið brúkandi kundar, eitt nú neyst, summarhús, seyðahús, festivalar og líknandi. Harumframt vildu nevndu brúkarar eisini økt (óneyðugt) um tøka máttin á framleiðsluverkunum, sum vil økja um almenna elprísin.

Úrslitið av hesum hevði verið ein størri íløga í netið og í framleiðsluverkini, sum hevði viðført ein hægri almennan elprís.

Hjá SEV er ein vanlig sethúsa íbinding 35 amper og var íbindingargjaldið 4.000 kr. Gjaldið fyri hvørt eyka amper hjá SEV var 200 kr., og høvdu hesi gjøld staðið í stað í fleiri ár.

Tá ið metast skuldi um, hvussu ein møgulig broyting í prísskránni skuldi gerast, var hugt eftir vegleiðingini hjá Dansk Energi, ið er branchufelagið hjá donku elfeløgunum. Víst verður til teirra "Model til beregning af tilslutningsbidrag" frá november 2011. Her framgongur, at íbindingargjaldið fyri vanligar kundar (C-niveau - 0,4 kV) var 1.185 kr. pr. eyka amper og 13.030 kr. fyri eina vanliga íbinding uppá 25 amper. Danska modellið hevði ein miðalprís uppá 954 kr. pr. eyka amper fyri vinnukundar (á B – 10/20 kV + C niveau - 0,4 kV).

Í sambandi við broytingina í 2013 var avgjørt at hava **ein** kostnað fyri íbindingargjaldið, galdandi fyri allar kundar, líka mikið á hvørjum spenningsstigi íbindingin í netið verður gjørd og líka mikið um talan er um privatkundar ella vinnukundar.

Gjaldið er ásett til 1.185 kr. pr. eyka amper. Kostnaðurin fyri eina vanliga sethúsaíbinding uppá 35 amper er 13.030 kr. og kostnaðurin fyri íbúðir við felagsteymi er 9.800 kr.

Prísbroytingin kann lýsast soleiðis:

| Íbinding | Gamal prísur í krónum | Nýggjur prísur í krónum | Broyting í krónum | Broyting í prosent |
|---|---|---|---|---|
| **Sethús** | 4.000 | 13.030 | 9.030 | 226 |
| **Íbúð** | 2.500 | 9.800 | 7.300 | 292 |
| **Eyka amper** | 200 | 1.185 | 985 | 493 |

Gjørda prísbroyting av íbindingargjøldunum er grundað á, at hetta virkisøkið skal hvíla í sær sjálvum hvat íløgum viðvíkur, og harvið ikki ávirka almenna elprísin. Møguligar framtíðar javningar av gjaldinum vilja tí bert taka støði í prísgongdini (prístalinum) í samfelagnum.

Vinarliga

Hákun Djurhuus
Stjóri

Bogi Bendtsen
Deildarstjóri